# Týsk rennilegenda við



*Stefan Schlett í gongd við Tórshavn-Marathon*
*Mynd: Niels Pauli Djurholm*

**Stefan Schlett úr Týsklandi hevur tikið lut í marathon og ultramarathon-kappingum í 86 ymiskum londum kring allan heimin. Hann hevur vitjað í Føroyum á øðrum sinni, og hevur longu vitjað 15 av okkara 18 oyggjum**

## Ítróttarmaður



**Heri Simonsen**
heris@sosialurin.fo

Millum tey sum tóku lut í Tórshavn-marathon fyri stuttum, var ein sonn rennilegenda úr Týsklandi. Talan er um hin 47 ára gamla týskaran, Stefan Schlett, sum hevur knýtt vinarbond við fólk frá renniumhvørvinum í Føroyum. Tað var í samband við eina ferð til Ìslands, at Stefan Schlett vitjaði í Føroyum á fyrsta sinni fyri seks árum síðani. Í 2003 vitjaði hann 13 oyggjar, og gjørdist hann hugtikin av serliga landslagnum í Føroyum.

– Mær dámdi so væl friðin, og tað góðu atmosferuna tit hava her í Føroyum.

Beint áðrenn mína fyrstu vitjan í Føroyum, frætti eg um tað fyrstu Tórshavn-marathon kappingina sum skuldi vera hetta summarið. Eg setti tá í meg, at eg skuldi koma aftur til Føroya fyri at taka lut í Tórshavn-marathon. Eg arbeiði sum blaðmaður, og sá ein góðan møguleika at skriva eina grein um hesa fyri mong rættiliga ókendu maraton-kappingina. Spurdur um hvussu nógv maraton hann hevur tikið lut í, svarar Stefan stundisliga: - Hetta var kapping nummar 636, sum eg havi tikið lut í. Við kappingini í Havn, so havi eg tikið lut í maratonkappingum í 86 ymiskum londum.

### Runnið í sjey heimspørtum

Stefan greiðir frá, at hann var bara